## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, Seinnapartin nakað minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið mikudagin og hósdagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 15 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og okkurt ælið, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.

# Síðstu summartónarnir

**Tónleikafagnaðurin Summartónar hevur nú brátt verið kring landið í eina viku og í dag og í morgin verða síðstu tónarnir at hoyra**

SUMMARTÓNAR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Summartónar er aftur-vendandi tónleikafagnaður í Føroyum. Ein av mongum dygdum við júst hesum tiltakinum er, at tónarnir røkka kring landið, tí skipað verður fyri tónleikatiltøkum á bygd og í bý. Alt landið fær vitjan.

Men á hesum sinni eru bert tveir dagar eftir av Summartónum.

Í dag, mánadag 7. juli, spæla Atli Ellendersen og Sune Vejlby Brogård í Mentanarhúsinum í Fuglafirði klokkan 20:00.

Aldubáran spælir í kirkjuni á Húsum klokkan 19:30.

Og Sjónleikarhúsið í Havn er klokkan 21:00 karmur um eitt heldur øðrvísi tiltak, har leikur, yrkingar og tónleikur spæla saman. Audio Exhibition við Annfinni Heinesen, sjónleikara, Matias Seibæk, slagverk, og Andras Olsen, trombon.

Týsdagurin 8. juli er síðsti dagurin og tá endar vikulanga skráin. Tað endar, sum tað byrjaði, við konsert í Klæmintsgjógv í Hesti frá klokkan 13:00 til 18:00. Har fer Dávur Juul Magnussen at spæla trombon.

Tað eru Felagið Føroysk Tónaskøld og Norðurlandahúsið, ið skipa fyri Summartónum.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 25 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 33 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 33 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 29 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1004 hPa. millum Bergen og Hetlands fer í útsynning og grynnist.



**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Skotland grynnist og ein hártrýstryggur yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsunm í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 01/07 kl. 06⁰⁰ – 02/07 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,8°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 01/07 kl. 06⁰⁰ – 02/07 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juli: 0 mm




Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

1. juli — Mánin næstur jørðini
3. juli — Tendring
4. juli — Jørðin longst frá sólini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. juli | 8:31 | 21:00 | 7:31 | 20:00 | 7:46 | 20:15 | 10:31 | 23:00 | 11:31 | - | 6:46 | 19:15 |
| 5. juli | 9:26 | 21:52 | 8:26 | 20:52 | 8:41 | 21:07 | 11:26 | 23:52 | 0:00 | 12:26 | 7:41 | 20:07 |
| 6. juli | 10:16 | 22:40 | 9:16 | 21:40 | 9:31 | 21:55 | - | 12:16 | 0:52 | 13:16 | 8:31 | 20:55 |
| 7. juli | 11:02 | 23:24 | 10:02 | 22:24 | 10:17 | 22:39 | 0:40 | 13:02 | 1:40 | 14:02 | 9:17 | 21:39 |
| 8. juli | 11:44 | - | 10:44 | 23:05 | 10:59 | 23:20 | 1:24 | 13:44 | 2:24 | 14:44 | 9:59 | 22:20 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. juli | 5:46 | 18:15 | 8:46 | 21:15 | 9:46 | 22:15 | 8:16 | 20:45 | 9:31 | 22:00 |
| 5. juli | 6:41 | 19:07 | 9:41 | 22:07 | 10:41 | 23:07 | 9:11 | 21:37 | 10:26 | 22:52 |
| 6. juli | 7:31 | 19:55 | 10:31 | 22:55 | 11:31 | 23:55 | 10:01 | 22:25 | 11:16 | 23:40 |
| 7. juli | 8:17 | 20:39 | 11:17 | 23:39 | - | 12:17 | 10:47 | 23:09 | - | 12:02 |
| 8. juli | 8:59 | 21:20 | 11:59 | - | 0:39 | 12:59 | 11:29 | 23:50 | 0:24 | 12:44 |